# Fagrir Fuglar fara suðureftir at spæla

**Karsten Vogel og hansara Birds of Beauty spæla í Suðuroynni um vikuskiftið**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Føroyavinurin og tónleikarin Karsten Vogel ferðast í Føroym í hesum døgum. Ætlandi skuldu tey spæla í Suðuroynni seinasta vikuskiftið, men eini ferðaætlan er ikki altíð lætt at vara seg fyri, tí hvørki fuglarnir ella fyrireikarar vórðu gjørdir varir við, at norðoyastevna var og at sambandið við Suðuroynna tískil ikki var sum vant, tí Smyril var í Klaksvík allan leygardagin.

Men nú royna Birds og Beauty aftur. Fríggjakvøldi spældu Vogel og hansara fólk í Stóra Pakkhúsi í Vági, har eisini írsku Máire Breatnach og Thomas Loefke spældu, og leygarkvøldið spæla Bird of Beauty í Tvøroyrar Klubba klokkan 21.

# Norðurlendskur ráðharrafundur í Føroyum

TÍÐINDASKRIV

Almanna- og heilsumálaráðið skipar í samstarvi við danska formanskapin í norðurlendska ráðharraráðnum fyri fundi millum almanna- og heilsumálaráðharrarnar í Norðurlondum.

Fundurin verður hildin á Hotel Føroyum 13.-14. juni.

Á fundinum verður millum annað viðgjørt:

- Hvussu samstarvið millum tann almenna og sjálvbodna sektorin í Norðurlondum kann betrast.
- Skipan av samstarvi í Norðurlondum á almanna- og heilsuøkinum í framtíðini.
- Samanbering av kvaliteti í teimum norðurlendsku heilsuverkunum.
- Norðurlendskt samstarv um altjóða alkoholpolitik.
- Burturbeiningar av forðingum á almanna- og heilsuøkinum fyri samstarvi og flyting millum Norðurlond.
- Stovnan av norðurlendskum samstarvsforum innan telemedisin.

Í sambandi við fundin verður ein virðisløn latin til ein norðurlendskan persón, ið hevur gjørt eitt serligt átak, fyri at betra um fólkaheilsuna í Norðurlondum. Virðislønina, ið verður latin í ár, verður avdúkað mánadagin 13. juni kl. 16.00 á Vaglinum á Hotel Føroyum. Eftir handanina verður hildin ein stuttur tíðindafundur, har møguleiki er at seta spurningar til teir norðurlendsku ráðharrarnar.




**Shell** søkir eftir bilførara í Eysturoy.
Arbeiðið umfatar vanliga koyring av brenniolju til privatar kundar, virki, skip og Shell-støðir v.m. Umsøkjarar mugu vera til reiðar at arbeiða skeivar tíðir í sambandi við t.d. skipaveitingar.

Vit ynskja ein persón sum er:
- ✔ Ágrýtin
- ✔ Tænastusinnaður
- ✔ Fleksibul (lagaligur)
- ✔ Samstarvssinnaður
- ✔ Álítandi
- ✔ Nærlagdur
- ✔ Røkin
- ✔ Jaligur og opin

Løn sambært avtalu

Áhugaði kunnu venda sær til Páll Jacobsen, avgreiðsluleiðara á 448711

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði og skulu í seinasta lagi 20. juni 2005 sendast til

Føroya Shell í Eysturoy
Postboks 28
640 Rituvík
att.: Páll Jacobsen

www.shell.fo

SISERO 35180




SO ER AFTUR KOYRANDI TIL ALLAR BYGDIR...

Nú tær seinastu fannirnar berjast fyri lívinum, fækkast umberingarnar fyri at fara ein túr. Hinvegin eru eisini óførir parkeringsmøguleikar millum ælini.

Barnadeildin í Handilskjarnanum bjóðar eitt dygdargott úrval av barnavognum og koyristólum.

Kom innar í barnadeildina og síggj úrvalið. Vit ráðgeva og leiðbeina.



**Simo**
Við lift og tasku
**Nú 5500,-**

**Carena**
Við lift og tasku
**Nú 2900,-**

**Carena lux**
Við lift og tasku.
**Nú 3300,-**



**Brio**
Við lift og tasku
**Nú 6000,-**

TEAM85

**Handilskjarnin í miðbýnum hýsir mannfólkadeild, konufólkadeild, barnadeild og Bianco footwear.**
Handilskjarnin · Niels Finsensgøta 8 · P.O. Box 1350 · 110 Tórshavn
Tel: 35 46 00 · Fax 35 46 01 · www.handilskjarnin.fo

Handilskjarnin